VIKUSKIFTI

Nr. 148 | vikuskifti | 7. august 2009 | 83. árgangur



*Lundabringa er ein rættur sum mongum dámar væl. Um lundastovnurin ikki mennist aftur, kann hetta gerast ein sera rárur rættur hjá føroyingum og útlendingum*

# Leskiligir lundar frá Lisabeth

## Matstova



**Snorri Bend**
snorri@sosialurin.fo

**Viðareiði:** - Hóast tað er ójavnt, hvussu nógv menn fáa av lunda her norðuri, so royni eg altíð at eiga lundar niðurfyri til tey vitjandi, sigur kokkurin Elisabeth, sum byrjaðu matstovu sína í 2003.

Hetta gjørdi hon um somu tíð sum nýggja Norröna kom. Og nú - seks ár seinni - kann hon líta aftur á ein hóp av vælnøgdum gestum, sum hava notið eina góða máltíð í norðastu matstovu okkara.

Hóast matarskráin er fjølbroytt við tí sum finst í havinum og á landi, eru tað tær væl úr hondum greiddu lundabringurnar sum uttan iva hava størsta áhugan hjá teimum vitjandi.

Hetta er ein serstakur rættur í dag, og verður kanska enn rárari rættur um nøkur ár, um ikki lundastovnurin fer at menna seg aftur.

- Ja, tað er heilt sikkurt, at tey sum hava roynt at eti lunda einaferð áður, vilja fegin gera tað aftur. Vit uppliva í øllum førum, at fólk koma aftur og aftur fyri at fáa sær lunda, slær Elisabeth Nybo fast.

Hetta skuldi verið besta prógvið um, at fólk dáma henda serføroyska rættin.

### Eingin leivd

Tað er eingi prangandi skelti sum boða frá hesi matstovuni í norðastu bygd okkara.
Men kemur tú koyrandi eftir høvuðsvegnum til Viðareiðis er ein á rættari leið til mastovuna hjá Elisabeth.

Inni í matstovuni stendur ein smílandi vertur og kokkur og tekur ímóti teimum gestunum, sum bæði telja føroyingar og útlendingar.

Hesi eru øll komin higar við tí í hyggju at fáa sær eina góða máltíð. Her er møguleiki at fáa rættir millum annað úr kjøti, fiski ella ein bert ynskir sær ein kaffimunn við onkrum góðum afturvið, m.a. tann vælsmakkandi og heimagjørda ísin hjá Elisabeth.

Tað serstaka við matstovuni man kortini vera møguleikin hjá teimum "lekkursultnu" at fáa eina leskiliga máltíð við lundabringu.

- Serliga føroyingum dáma væl lunda, tí teir munnu hava hoyrt um henda rættin frá øðrum. Hinvegin so havi eg eisini sæð mangar útlendingar bíleggja sær lunda, sum teir við fyrsta eygnakasti hyggja eitt sindur skeptiskir til, tá hann verður serveraður.

- Men líka so skjótt sum teir hava fingið smakkin av lundunum, eta teir so væl upp, at tað næstan ikki er kjøtbitin eftir. Teir vilja hava alt við!, sigur Elisabeth við einum brosi.

### 81 gestir

Hóast Elisabeth ikki hevur heimasíðu við matskrá síni, er líkt til at fólk eru so fegin um hetta matstaðið á Viðareiði, at tey siga øðrum frá hesi matstovuni.

Eitt dømi um hetta, var eitt kór úr Íslandi sum vitjaði á matstovuni fyri nøkrum árum síðani. Afturkomin av ferðini greiddu sangararnir frá um Føroyar, har fleiri teirra uttan iva hava viðmælt matstovuna hjá Elisabeth. Júst hetta fekk hon prógv fyri nakað seinni.

- Tá kom ein maður á gátt hjá mær, sum hevði hoyrt hinar siga frá ferðini. Ein teirra hevði beinleiðis sagt við hann "Tá tú kemur til Føroyar, far so norður til Elisabeth og fá tær ein bita. Har verður tú ikki skuffaður".

- Tú kanst ætla, at slíkt fløvar, sigur hon.

Sigast skal, at matstovan ikki telist millum tær størstu, og tí er lætt at fylla hana upp við fólki. Hóast tað kann tykjast trongligt fyri onkran, megna Elisabeth og starvsfólk hennara kortini at skapa ein serstakan hugna og vælveru hjá teimum vitjandi.

Hon hevur higartil í summar havt nógvar matgestir á gátt nú eftir ólavsøkuna, eins og hon hevur gjørt mat út av húsinum. Summir dagar hava verið rættiliga strævnir, meðan hon aðrar tíðir hevur havt færri gestir, samstundis sum hon fyrireikaði seg uppá komandi uppgávur.

- Ja, hetta er ein sjáldsom bransja. Eitt kvøldi, tá eg fór til songar stóð einki á ordraseðlinum dagin eftir. Men um morgunin byrjaði telefonin at ringja, og tá eg taldi upp um kvøldið, hevði eg havt 81 gestir!



*- Mong fara fyrst ein túr við Alpha Pilot undir Enniberg og koma síðani at eta lunda her hjá mær. Hava tey fyrst fingið smakkin av lundanum, koma tey heilt sikkurt aftur, sigur Elisabeth Nybo, sum rekur matstovu á Viðareiði*

Mynd: Jens Kristian Vang